# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Heilsan til Jóhannus Martin Solmunde

### 80 ára degnum 3. februar



Góði Hannus abbi.

Bara ein lítil heilsan til tín á 80 ára føðingardegi tínum.Tað tykist eitt sindur løgið, at tú skalt verða 80 ár, tí tú virkar nógv yngri - serliga í sinni.

Tað er altíð so deiligt at koma at vitja teg og ommu. Mann merkir so væl, at tit eru glað fyri tað. Og at síggja, hvussu góður tú ert við ommu... - tað er ótrúligt. Tað er ein stórur eginleiki hjá tær, at tú dugir væl at vísa kærleika uttan at siga ella gera nakað serligt, bara við at vera tann, tú ert.

Haldi ikki, at eg nakrantíð havi upplivað teg í ringum lag, og bara tað í sær sjálvum hevur havt eina stóra ávirkan á øll tey, sum eru um teg. Tú ert so raskur og rokast altíð við okkurt, sjálvt um heilsan kanska ikki altíð hevur verið av tí besta.

Altíð ert tú í góðum lag og klárur at geva eitt klemm, bleytur og kensluborin, og tað er so deiligt. Tú hevur ongantíð verið tann, sum hevur sagt so nógv. Men trý orð, sum tú ongantíð hevur verið sparin við at siga, og sum eg altíð hoyri frá tær, eru: "Abbi elskar teg" - meira enn tað er ikki neyðugt at hoyra.

Tú dugir á so mangan annan hátt at vísa, at tú ert áhugaður í og góður við tey nærmastu hjá tær. Minnist hvussu "cool" eg helt tað vera, at tú vart í ítrottarhøllini og við fótbóltsvøllin og hugdi at, meðan eg spældi hond- og fótbólt, og tú vart eisini sera stoltur at síggja til, tá eg skoraði okkurt máli. Og fór eg um koll, ella helt tú, at onkur kanska var í so harðligur við meg - ja, so hoyrdist eisini, at tú ikki vart nøgdur við tað... men eisini tað hevur sína sjarmu.

At enda, abbi, vil eg ynskja tær og ommu alt tað besta í tíðini, sum liggur fyri framman, og takk fyri, at tit hvønn dag biðja Jesuspápa vera hjá okkum og verja okkum. Tað er so trygt og gott at vita, og má Hann eisini signa tykkum framyvir.

Kærar heilsanir frá

**elstu abbadóttrini**

### 90 ára føðingardagur

Hósdagin 3. februar fyllir Malla Berg Olsen, Toftir, 90 ár.

Dagurin verður hildin í kirkjukjallaranum í Fríðrikskirkjuni kl. 18.30.

# Merkið veittraði á Kilimanjaro




*Jákup Alberg Berg á tindinum á Kilimanjaro við føroyska flagginum og m.a. ílatin undirklæðir og troyggju frá Tøting í Gøtu. Myndina hevur ein av ferðaleiðarunum tikið*

**Sunnudagin 30. januar 2005 náddi Jákup Alberg Berg úr Havn tindin á einum av heimsins hægstu fjøllum, Kilimanjaro í Tanzania, sum við sínum 5.895 metrum er hægsta fjall í Afrika**

FJALLAKLINTRARI
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Tað kavaði, og kuldin var umleið minus 20 stig, tá havnarmaðurin Jákup Alberg Berg náddi tindinum á Kilimanjaro sunnudagin kl. 06.45.

Kilimanjaro í Tanzania er eitt av heimsins hægstu fjøllum og er við sínum 5.895 metrum hægsta fjall í Afrika.

Tey vóru fýra, Jákup Alberg og tríggir danir, sum høvdu sett sær fyri, at klára túrin uppá Kilimanjaro uppá 6 dagar. Túrurin byrjaði mikudagin 26. januar, og tey byrjaðu frá 1.700 metrum.

Um miðnáttarleitið leygarkvøldið byrjaði túrurin upp á sjálvan tindin, teir seinastu knøppu 1200 metrarnir.

Av teimum fýra var tað bert Jákup Alberg, sum gjøgnumførdi túrin upp á tindin.

Jákup Alberg sigur í telduposti, at túrurin var og ótrúliga krevjandi og nógv torførari, enn hann hevði roknað við.



*Her fær Jákup Alberg Berg prógvið, sum vísir, at hann náddi tindin á Kilimanjaro*

## Litmyndir av brúðarpørum í Vikuskiftis Sosialurin

Sum nakað nýtt seta vit nú allar myndir av brúðarpørum, sum vera sendar til til teigin "Heilsanir", í Vikuskiftis Sosialin í **litum**.

Brúðarmyndirnar koma undir somu treytir sum aðrar myndir til "Heilsan-ir", t.v.s. at tær kosta 30 kr.

***Síðsta freist at lata brúðarmyndirnar inn er hósdag kl. 12.00***

**Sosialurin**